## Nýy lemjandi vápn

Um nakrar mánaðir fara amerikanarar at royna eitt nýtt vápn. Talan er um eina laserstrálu, sum lemjir fólk, soleiðis at tey fáa einki gjørt. Hinvegin ávirkar vápnið ikki hjartað ella lunguni, og fólk fáa ikki mein av tí. Kortini skal vápnið í fyrsta umfari skal vápnið roynast við høsnarungum, skrivar Reuter.

Keldur í amerikonsku herleiðsluni siga, at eydnast royndirnar við høsnarungunum væl, kann herurin taka tað nýggja vápnið í nýtslu um nakrar mánaðir. Keldurnar siga, at vápnið er væl egnað til at steðga einari mótmælsigongu ella at doyva fólk, sum skulu takast. Tær dylja ikki fyri, at tey nógvu mótmælini í Irak hava skundað undir arbeiðið við laservápninum, tí tað hevði verið væl egnað til at steðga áganginum har.

Aðrar keldur hava upplýst, at amerikanski herurin ger eisini kanningar við mikrobylgjuvápnum. Mikrobylgjurnar fáa vatnið í húðini hjá fólki at kóka, so tað kennist, sum at húðin brennur. Tað skal so fáa fíggindan til at taka til rýmingar, skrivar Reuter.

## Rúmsátt í ANC

Sunnudagin kunngjørdi leiðslan í suðurafrikanska flokkinum New National Party, at flokkurin verður limaður inn í stjórnarflokkin ANC.

Tað var í síni tíð New National Party, sum kom við apartheid-politikkinum, og sum setti ANC forboð fyri at virka. Men síðani er nógv broytt. Í dag sita teir báðir flokkarnir saman í stjórn, og formaðurin í NNP, Marthinus van Schalkwyk, er ráðharri í umhvørvis- og ferðavinnumálum. Hann sigur, at NNP verður ikki uppleystur, men at flokkurin fer at samstarva við ANC í øllum viðurskiftum. NNP hevur sjey umboð í suðurafrikanska tjóðartinginum.

Thabo Mbeki, forseti, segði í gjár, at avgerðin hjá New National Party er søgulig. Hann segði, at avgerðin fer at fáa stóran týdning fyri tað politiska arbeiðið í Suðurafrika og fer at skunda undir menningina í landinum.

## Sviar bíligari brennivín

Svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, er til reiðar at virka fyri, at avgjøldini á brennivíni verða lækkað, so sviar kunnu fáa bíligari brennivín.

Svøríki hevur einkarsøluskipan, men forsætisráðharrin sigur, at tað er torfø'rt at varðveita skipanina, tí í hinum londunum er brennivínssølan frí. Hann vísir eisini á, at nógvir sviar keypa brennivín og annað sterkt í Danmark og øðrum londum, har prísirnir eru nógv lægri.

Júst spurningurin um rúsdrekkaprísirnar var eitt av evnunum á norðurlendska forsætisráðharrafundinum á Akureyri sum vikuskiftið. Á einum tíðindafundi segði norski stjórnarleiðarin, Kjell Magne Bondevik, at verða avgjøldini á rúsdrekka lækkað í Svøríki, fer tað sjálvandi at leggja trýst á norsku stjórnina at gera tað sama. Hann duldi ikki fyri, at hann er ikki serliga fegin um gongdina í Svøríki og aðrastaðni.

## Svam í land fjøtraður

Ein italiumaður prógvaði seinasta fríggjadag, at tað ber til hjá einum fjøtraðum fanga at svimja av teirri kendu amerikonsku fongsulsoynni Alcatraz inn á land.

Tann 43 ára gamli Alberto Cristini var bundin á hendur og føtur, tá hann grulvaði oman á sjógv á Alcatraz, og 50 minuttir seinni grulvaði hann upp á land við San Fransisco. Teinurin er tríggjar kilometrar. Komin upp á land greiddi italiumaðurin frá, at ferðin hevði verið strævin, men at hann kortini ikki kendi seg útlúgvaðan.

Amerikonsku myndugleikarnir hildu í mong ár uppá, at eingin fangi kundi svimja í land bundin á hendur og føtur, tí streymurin innan fyri Alcatraz er so harður. Men fleiri hava seinni prógvað, at tað ber væl til, og nú hevur Alberto Cristini so eisini prógvað tað.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Tyrlur sum yvirgangsvápn

**Pakistansku myndugleikarnir hava illgruna um, at al-Qaeda ætlat at nýta tyrlur til yvirgangsatsóknir at málum í USA**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Myndugleikarnir í New York og øðrum stórum amerikonskum býum hava hert eftirlitið við allari tyrluflúgving.

Orsøkin er, at myndugleikarnir í Pakistan halda seg hava fingið ábendingar um, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda kann fara at nýta ferðamannatyrlur til at søkja at málum í USA við.

Hvønn dag eru fleiri tyrlur á flogi uppi yvir New York við ferðafólki, sum vilja sleppa at síggja tey ymsu kendu støðini í býnum úr erva. Men sambært pakistansku myndugleikunum er tað ikki óhugsandi, at yvirgangsmenn fara at royna at leiga eina ellaa fleiri av hesum tyrlunum og at nýta tær sum sjálvmorðsvápn.

Ferðamannatyrlurnar, sum flúgva uppi yvir New York, hava tríggjar flogvallir uttan fyri býin, og nú hava myndugleikarnir hert eftirlitið við ferðafólkunum, skrivar AP.

Sambært CNN komu pakistanar fram á ábendingarnar um tyrluálop í einari av teldunum, sum teir funnu í íbúðini hjá Muhammad Naeem Noor Khan. Hann varð tikin í Lahore í síðstu viku og verður hildin at vera ein av oddamonnunum í al-Qaeda.

# Irakskir uppreistrarmenn fáa vápn úr Iran



*Ahmed Chalabi. Undan krígnum í Irak var hann dagligur gestur í Washington. Nú skal hann fyri rættin*

**Irakska stjórnin vil vera við, at grannalandið Iran letur uppreistrarmonnunum vápn, sum teir kunnu halda fram við bardøgunum.**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Teir seinastu dagarnar hava harðir bardagar verið ímillum amerikanskar hermenn og irakskar uppreistrarmenn. Tað hevur víst seg, at uppreistrarmenninir eru væl vápnaðir, og nú vil irakska stjórnin vera við, at vápnini koma úr grannalandinum Iran.

– Vápnini, sum vit hava tikið frá uppreistrarmonnum í býnum Najaf, vóru av iranskum uppruna, og tað er týðiligt, at uppreistrarmenninir hava fingið tey hinumegin markið, segði irakski verjumálaráðharrin, Hazem Shaalan, við sjónvarpsstøðina al-Aeabiya í gjár.

– Tað, sum vit hava funnið, sigur okkum, at okkara ringasti fíggindi stendur aftan fyri ágangin, segði Hazem Shaalan.

Mikudagin í síðstu viku kunngjørdi tann víðgongdi shiamuslimski presturin Muqtada al-Sadr, at hann hevði gjørt av at halda fram við krígnum við amerikanarar og bretar. Síðani hava harðir bardagar verið í Najaf og øðrum býum. Amerikanararnir vilja vera við, at einir 300 uppreistrarmenn eru falnir, men talsmenn hjá al-Sadr avsanna, at teir hava mist so nógvar menn.

Chalabi skal takast

Undan krígnum í Irak var irakski handilsmaðurin Ahmed Chalabi ímillum teirra, sum eggjaðu USA til at koyra Saddam Hussein frá, og hann var fleiri ferðir í Washington og tosaði við leiðararnar har.

Men nú hava iraksku myndugleikarnir givið boð um, at Chalabi skal takast, tí hann er skuldsettur fyri at hava falsað pengar. Systkinabarn hansara, Salem Chalabi, skal eisini takast, tí myndugleikarnir leggja hann undir morð, sigur CNN. Tað var annars Salem Chalabi, sum avhoyrdi Saddam Hussein.

Ahmed Chalabi vísir skuldsetingunum um pengafalsan aftur. Myndugleikarnir í Jordan vilja eisini hava fatur á honum, tí har er hann dømdur fleiri ára fongsul fyri svik.



# Norðoya Sparikassi á Summarfestival

**– Tað kostar at byggja nakað upp, men eg eri vísur í, at við teimum røttum umstøðunum er Summarfestivalurin eitt tiltak, sum er komið fyri at vera, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa**

SUMMARFESTIVAL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, ivast ikki í, at Summarfestivalurin komandi vikuskifti verður eitt afturvendani tiltak og eitt gott boð uppá, hvat veruliga fer at lokka fólk til Klaksvíkar í august mánað framyvir*

*Mynd: Jan Müller*

Tá størsta tónleikatiltakið í Norðyggjum nakrantíð fer av bakkastokki komandi vikuskiftið, liggur luturin hjá Norðoya Sparikassa ikki eftir. Umframt at vera høvuðsstuðul hjá Summarfestivalinum, bjóðar sparikassin eisini øllum til stórt uttandura morgunmatarborð í miðbýnum leygarmorgunin, har onkrir av solistunum á festivalinum eisini verða at hoyra av sparikassapallinum. Sparikassin fyllir nevniliga eisini 85 ár í ár og hevur valt at nýta hetta høvið til at hátíðarhalda dagin. Vanligt er annars bert at hava eina lítla móttøku, men sparikassastjórin sigur, at tey leingi hava hugsað um at gjørt okkurt meir burturúr, so at allir norðoyingar eisini kunna vera partur av hátíðarhaldinum. Og tí var tað upplagt at gera tað hendan festival-leygarmorgunin.

### Trýr uppá tiltakið

Spurdur um, hví sparikassin hevur sagt ja til at vera høvuðsstuðul hjá Summarfestivalinum, sigur Eyðfinn Reyðberg, at tað kemst av fleiri orsøkum.

– Vit hava frá byrjan trúð uppá hetta tiltakið. Áhugabólkurin aftanfyri er settur saman av persónum við røttu førleikunum til at tryggja, at tiltakið er í so góðum góðum hondum, sum til ber, líka frá tí tekniska til tað fíggjarliga. Men fyrst av øllum er hetta eitt sera fólksligt tiltak, har okkurt er fyri flestu aldurs- og áhugabólkar, sigur Eyðfinn.

Eyðfinn heldur eisini tiltakið fríggjakvøldið, har Ken Hensley fer at greiða frá sínum royndum og arbeiði við at gera tónleik, vera eitt øðrvísi og positivt innslag, sum ikki minst ungir ambitiøsir tónleikarar kunnu fáa stóra gleði av. Hann heldur hetta vera eitt týðiligt tekin um, at fyrireikarnir eru nakrar eldsálir, ið meina nakað við tað, og at slíkum kreftum eiga vit at øll at stuðla.

– Vit eru sum oftast skjót at fílast á, at ov lítið hendir her norðuri, men ofta er tað misjavnt við uppmøtingini, tá so onkur endiliga tekur stig til at gera nakað. Nú haldi eg vit øll hava eitt gott høvi til at vísa stigtakarnum, at teir ikki standa einsamallir, sigur Eyðfinn.

### Sparikassin og tónleikurin

Hetta er ikki fyrstu ferð, navnið á Norðoya Sparikassa er at síggja í samband við tónleik. Tá peningastovnurin fylti 80 ár, varð »Tónleikagrunnur Norðoya Sparikassa« settur á stovn, og endamálið við grunninum er at stuðla og menna tónleikin í Føroyum í breiðari merking. Hesi fimm árini, grunnurin hevur virkað, hevur hann latið út við 1 millión í stuðli til fløguútgávur, tónleikatiltøk og einstaklingar, og onkur av hesum nøvnunum verða eisini at síggja á Summarfestivalinum.

Eyðfinn Reyðberg sigur, at tað sjálvsagt altíð liggur nakað av marknaðarføring í at stuðla einum tiltaki sum Summarfestivalinum, men at tankin hesuferð røkkur nakað væl longri enn bara til stuttskygdan lýsingarvinning.

– Tað kostar at byggja nakað upp, men eg eri rættiliga vísur í, at við teimum røttu umstøðunum frá byrjan, kann Summarfestivalurin gerast eitt tiltak, sum er komið fyri at vera, og sum fer at lokka nógv fólk hendan vegin tá tunnilin kemur, sigur Eyðfinn, sum heldur tað vera sera hóskandi at Klaksvíkin við Norðoyastevnuni í mei/juni og Summarfestivalinum í august soleiðis verður karmur um byrjanina og endan á føroyska stevnu- og festivalárinum. Sjálvur er Eyðfinn sera spentur til komandi vikuskifti, men enn hevur hann ikki rættiliga gjørt av, hvørjum hann fer at lurta eftir.

– Í fyrsta umfari fari eg at peila av, práta við fólk og so annars njóta tann serliga festivalstemningin, sum fer at merkja býin hesar dagarnar, sigur sparikassastjórin, sum vónar at síggja nógv fólk í býnum komandi vikuskiftið.

Gallerí Kunningarstovan:

# Tvær klaksvíkskvinnur hava listaframsýning



*»Fólk« hjá Siggu Petersen*

**Fríggjadagin lat upp listaframsýning í Gallerí Kunningarstovan hjá teimum báðum klaksvíkskvinnunum Siggu og Lydiu Petersen**



*»Í Gjógv« hjá Lydiu Petersen*

Sigga Petersen byrjaði at mála fyri eini 3–4 árum síðani. Hon hevur verið við á framsýningum fyrr, eitt nú á Norðoyastevnuframsýningini og á framsýningini »Fram í ljósið« hjá Norðoya Sparikassa, men hetta er fyrstu ferð, hon meira ella minni hevur sjálvstøðuga framsýning. Myndevnini hjá Siggu eru fyri tað mesta landsløg, men hon roynir seg eisini við meir abstraktum huglagsmyndum.

Lydia Petersen er vorðin ein rættiliga kend listakvinna eftirhondini. Hon hevur verið við á nógvum framsýningum, og serliga hava hennara pappírs klippmyndir verið vælumtóktar. Hesuferð eru tó ongi klipp við, men akvarellir og oljumálningar av landsløgum og bygdum, bæði í kenda stílinum hjá Lydiu og í onkrum nýggjum meir eksperimenterandi útgávum

Tilsamans telur framsýningin hjá Lydiu og Siggu í Norðoya Kunningarstovu heili 41 størri og smærri myndir.

Framsýningin er at síggja hvønn dag í vanligu upplatingartíðunum hjá hjá Kunningarstovuni.

**-ave-**